


21 ár eru liðin, síðani Jan Andreasen fyri fyrstu ferð spældi dyst fyri besta KÍ-liðið. Í dag er hann ein av teimum royndu spælarunum, sum skulu stuðla upp undir arbeiðinum at byggja eitt nýtt ættarlið upp

Mynd: Álvur Haraldsen

# Spæla nýtt lið saman

**Mestsum allir spælararnir hjá KÍ í ár eru úr Norðoyggjum**

Fyrstu ferð Jan Andreasen stóð á einum dómaraseðli hjá KÍ í bestu mansdeildini, var afturi í 1988, tá hann sum 15 ára gamal var einasti útskiftarin hjá 3. deildarliðnum, sum brádliga mátti traðka til í 1. deild, har tað eydnaðist at basa VB.

Trý ár seinni var hann fastur maður á besta mansliðnum og hevur verið tað síðani. Tað var í 1991, tá Petur Mohr var komin til Klaksvíkar sum venjari og tók nógvar ungar inn á liðið, og tað árið royndist so mikið væl, at KÍ vann sítt fyrsta føroyameistaraheiti í 19 ár.

Nú telist 36 ára gamli Jan Andreasen millum veteranarnar í hópinum hjá KÍ, sum fyri tað nógva er mannaður við ungum spælarum. Umframt Jan eru so nakrir eldri við, sum allir eru í 30-unum – Allan Joensen, Arnold Joensen og Jákup Mikkelsen, sum bæði spælir sjálvur og venur liðið saman við Alexander Djordjevic.

**Tekur ábyrgd**

– Tað er slett ikki so galið at vera millum allar hesar ungu. Teir eru ágrýtnir og óførir, umframt at teir eru lættir at vera saman við. At eg eri í eldra endanum, merkir sjálvandi, at eitt sindur av ábyrgd fylgir við, men tí kann eg saktans liva við, sigur Jan Andreasen.

– Tó er tað so, at eg framman undan havi bæði arbeiði og familju at hugsa um, so eg má bara royna at venja so nógv, sum eg klári, og so royni eg at bjóða teimum yngru av í kappingini um eitt pláss í verjuni. Skjótleikin er sjálvandi ikki hin sami, men so má eg bara leggja størri dent á aðrar dygdir.

Jan letur væl at uppmøtingini til venjing, tí at byrja við var nóg mikið av fólki til tvey lið, men nú eru teir einir 18-20 mans, sum fyri tað mesta eru ungir og lokalir spælarar. Erland Berg Danielsen er komin av Skála og Adrian Stauss úr Leirvík, men allir hinir eru heimahoyrandi eystan fyri Leirvíksfjørð.

**Strævið í fjør**

Kappingarárið í fjør var eitt av teimum minni góðu, og tað eydnaðist at skava 28 stig saman, so liðið endaði júst røttu megin niðurflytingarstrikuna. Fleiri ferð var talan um avgerandi botnumfør, men KÍ yvirlivdi og er framvegis við í fremstu røð, har felagið uttan slit hevur verið síðani 1942.

– Tað var tungt at koma ígjøgnum árið í fjør, tí vit alla tíðina lógu so niðarlaga. Torført var at vinna dystirnar, og hvørja ferð vit hildu, at nú vóru vit á veg uppeftir, stóð aftur fast hjá okkum, sigur Jan Andreasen, sum tó er bjartskygdur, nú eitt kappingarár aftur stendur fyri framman.

– Vit skulu sjálvandi spæla eitt spildurnýtt lið saman, men eg haldi, at tað sær ikki so galið út hjá okkum. Tá so nógvir ungir eru við, so kann tað vera so skjótt, at einir tveir ella tríggir av teimum sláa ígjøgnum, og tað kann eisini gera tað lættari hjá hinum. Í ár mugu vit royna at hyggja uppeftir og bara geva tol.

**Mást vísa nakað**

Gjøgnum árini hevur KÍ vunnið næstflest meistaraheiti av øllum feløgunum, og tí er tað ikki sørt krevjandi at vera fótbóltsspælari í Klaksvík.

– Skalt tú spæla við KÍ, mást tú vísa nakað. Her verður alla tíðina tosað um fótbólt og fólk ganga sera høgt upp í tað, men eg haldi, at prátið í ár er sera jaligt. Tað tekur tíð at spæla liðið saman, so vit kunnu vænta, at tað verður eitt sindur upp og niður. Men tað sær rímiligt út, so eg rokni við, at vit enda onkrastaðni í miðjuni og helst í ovaru helvt á stigatalvuni, sigur Jan Andreasen.

Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

## Metingin

**Í visjónsárinum 2009 er KÍ ikki nakar favorittur, men hinvegin er meira visjón yvir KÍ, enn tað hevur verið leingi. Blandingurin av nógvum ungum og nøkrum eldri sær spennandi út, og eydnast at sigla millum skerini, er eingin ivi um, at KÍ hevur eitt mestsum framtíðartryggjað lið at byggja víðari á. Í ár snýr tað seg helst mest um at yvirliva – men tað plagar KÍ at gera, tá mest stendur á.**

